FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 25. september 2023

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-18/2023 frá Eiriki í Jákupstovu, løgtingsmanni, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum, Ruth Vang, um landafrøðiligt býti av øktum rakstrarútreiðslum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv er raksturin á landsins fíggjarlóg við staðseting í høvuðsstaðnum samanborið við restina av landinum í krónum og prosentum í tíðarskeiðnum 2012-2022?

Svar:
Spurningurin er torførur at svara, tí rakstrarútreiðslurnar á landsins fíggjarlóg hava onga ávísa landafrøðiliga staðseting. Harumframt er tað eitt krav, at almennir stovnar skulu bjóða út keyp av vørum og tænastum. Tað merkir, at meginparturin av útreiðslunum til vørur og tænastur ikki landafrøðiliga fella, har sum stovnarnir eru staðsettir, men har sum landið fær besta prís fyri bestu góðsku. Eitt annað viðurskifti, ið ger seg galdandi er, at í Føroyum eru ofta bert ein, tveir ella tríggir veitarar av eini vøru ella tænastu, sum er ein rættiliga stórur partur av almennu útreiðslunum. Í tele, ferðing við Atlantic, apotek, orku, kt og grannskoðan fella útreiðslurnar í økir, har veitararnir eru staðsettir, og ikki har sum stovnurin, ið brúkar pengarnar, er staðsettur.

Í mun til rakstur fer størsti parturin til lønir. Viðvíkjandi útreiðslunum til lønir sæst, at tað ikki er samsvar millum, hvar fólk búgva og arbeiða. Góða vegasambandið ger, at nógv fólk koyra til arbeiðis, serliga nú meginøkið so væl er bundið saman. Tað gevur sostatt eina skeiklaða mynd at hyggja eftir, hvar stovnurin, sum rindar lønina, er staðsettur.

Verður í staðin hugt eftir, hvar í landinum, tær almennu lønarkrónurnar fella og harvið, hvar skattur verður goldin og fólk brúka sínar pengar, ber til at fáa eina ábending um viðurskiftir, sum spyrjarin ynskir at fáa nærri lýst.

Fyri at fáa eina mynd av hesum, hevur Gjaldstovan hugt í lønarskipanini eftir, hvar fólk búgva í tí ári, sum lønin er útgoldin.

Tølini fyri lønir eru ikki samanbarlig frá 2012 og 2022. Høvuðsorsakirnar eru, at eldrarøktin varð flutt út til kommunurnar í 2015, at Strandfaraskip Landsins ikki kom við í lønarskipanina hjá landinum, fyrr enn í 2014, og Apotekið í 2016. Fyri at gera tølini samanbarlig og fáa greina eina gongd, hevur verið neyðugt at reinsa tølini. Eldrarøktin, Strandferðslan og Apotekið eru tikin úr

tølunum. Hetta merkir, at Suðuroy, uttan iva, hevur ein størri vøkstur í 2022 enn tað, sum verður víst í talvuni niðanfyri, tí SSL og Suðuroyar Apotek eru staðsett í Suðuroy.

Talva 1: Index fyri útgoldin løn á fíggjarlógini býtt á øki fyri tíðarskeiðið 2012 til 2022

øki	Løn 2012	Løn 2013	Løn 2014	Løn 2015	Løn 2016	Løn 2017	Løn 2018	Løn 2019	Løn 2020	Løn 2021	Løn 2022
Útland	100	108	108	108	127	126	127	130	134	165	179
Skálafjørður	100	100	100	110	119	126	135	143	150	159	170
Sandoy	100	92	96	105	111	121	125	152	151	161	163
Kvívík og Vestmanna	100	103	101	109	121	115	118	132	136	153	160
Fuglafjørður og Eysturk.	100	102	104	109	113	117	123	129	134	144	158
Eiði og Sund	100	95	101	106	114	119	132	138	142	146	158
Vágarnar	100	103	104	111	116	119	129	137	142	150	156
Miðal	**100**	**103**	**105**	**107**	**114**	**118**	**125**	**130**	**136**	**144**	**150**
Tórshavn	100	102	100	109	115	120	126	130	138	144	148
Suðuroy	100	100	99	94	100	103	113	119	124	132	139
Norðoyggjar	100	104	104	102	109	111	111	119	122	131	138

Kelda: Gjaldstovan - LKS - løndátavøruhúsið. Tølini eru uttan SSL, Apotekini, Eldrarøkt og Ferðaráð Føroya

Talva 2: Útgoldin løn á fíggjarlóg í miliónum krónum býtt á øki, tíðarskeiðið 2012 til 2022

øki/ár í mió.kr.	***2012***	***2013***	***2014***	***2015***	***2016***	***2017***	***2018***	***2019***	***2020***	***2021***	***2022***
Norðoyggjar	166	173	173	170	181	184	184	197	203	218	229
Fuglafjørður og Eysturk.	91	93	94	99	102	106	111	117	122	130	143
Skálafjørður	137	138	137	151	164	173	185	196	206	219	233
Eiði og Sund	61	59	62	65	70	73	81	85	87	90	97
Kvívík og Vestmanna	53	55	54	58	64	61	63	70	72	81	85
Vágarnar	67	69	70	74	78	80	87	92	95	101	104
Sandoy	24	22	23	25	27	29	30	37	36	39	39
Suðuroy	124	124	122	116	124	128	140	147	153	164	172
Tórshavn	1.063	1.081	1.069	1.160	1.221	1.272	1.344	1.386	1.466	1.531	1.570
Útland	38	60	118	41	48	48	48	49	51	63	68
Tilsamans	**1.825**	**1.872**	**1.921**	**1.959**	**2.080**	**2.153**	**2.272**	**2.376**	**2.490**	**2.635**	**2.740**

Kelda: Gjaldstovan - LKS - løndátavøruhúsið. Tølini eru uttan SSL, Apotekini, Eldrarøkt og Ferðaráð Føroya

Í mun til keldur til lønargjaldingar, og sum eitt alternativ til lønardátuvøruhúsið hjá Gjaldstovuni, eru tøl frá Hagstovuni viðfest, sum skjal 1 og skjal 2.

Hagstovan hevur brúkt STSS og tær geirakotur og bústaðir, sum hon hevur á útgjaldstølunum (a-tøl) í innanhýsis eindarskránni, ímeðan bústaðurin hjá løntakaranum er fingin til vega úr landsfólkayvirlitinum.

Tølini hjá Hagstovuni vísa lønargjaldingar fyri allan almenna geiran tilsamans við teimum ymsu almennu undirgeirunum, ið eru flutt á økir. Við hesum eru "landsstovnar við játtan á fíggjarlógini" ikki ein flokking í sjálvum sær, men eiga, fyri ein stóran part, at vera flokkaðir í geira 'S.13111 Landsfyrisiting og tænasta'. Tølini svara ikki spurninginum neyvt, men vísa

eina betri og breiðari mynd av lønargjaldingum í almenna geiranum tilsamans við undirgeirum, soleiðis sum hesin er tilskilaður av Hagstovuni.

Tann komandi virkisskráin fer at geva Hagstovuni arbeiðsstøð, men fram til at hendan verður tøk, er bert bústaður á útgjaldstalinum. Tað merkir, at allar útgoldnar lønir hjá Strandferðsluni hava bústað í Suðuroy, so í mun til útgoldnar lønir, er framvegis ein óvissa í tølunum hjá Hagstovuni í skjal 1 og 2.

Tinganes, 25. september 2023

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Skjal 1: Útgoldin løn yvir samtíðarskattaskipanina (STSS) fyri útgjaldsøki (fevnd av óvissu) fyri almenna geiran.

Skjal 2.: Útgoldin løn yvir samtíðarskattaskipanina (STSS) hjá almenna geiranum býtt bústaðaraøki hjá løntakara

Skjal 1: Útgoldin løn yvir samtíðarskattaskipanina (STSS) **fyri útgjaldsøki** (fevnd av óvissu) fyri almenna geiran. Kelda Hagstovan

Útgoldin løn yvir samtíðarskattaskipanina (STSS) fyri útgjaldsøki (fevnd av óvissu) fyri almenna geiran	2012	2022	%-býti, 2012	%-býti, 2022	%-br, 2012-2022
Tað almenna tilsamans	**3.123.182.569**	**4.578.569.200**	**100%**	**100%**	**47%**
Norðoya Sýsla	233.863.130	367.395.685	7%	8%	57%
Eysturoyar Sýsla	338.105.417	554.695.940	11%	12%	64%
Norðstreymoyar Sýsla	65.733.522	126.721.443	2%	3%	93%
Suðurstreymoyar Sýsla	1.992.546.802	2.846.654.042	64%	62%	43%
Vága Sýsla	220.607.379	276.550.080	7%	6%	25%
Sandoyar Sýsla	32.318.868	52.390.414	1%	1%	62%
Suðuroyar Sýsla	240.007.451	354.161.595	8%	8%	48%
S.11101 Ikki-fíggjarlig feløg; almenn	**418.357.737**	**572.030.312**	**100%**	**100%**	**37%**
Norðoya Sýsla	771.196	6.646.072	0%	1%	762%
Eysturoyar Sýsla	23.075.442	44.285.374	6%	8%	92%
Norðstreymoyar Sýsla	10.709.474	13.751.209	3%	2%	28%
Suðurstreymoyar Sýsla	289.885.421	352.815.134	69%	62%	22%
Vága Sýsla	93.916.203	148.646.782	22%	26%	58%
Sandoyar Sýsla		472.882	0%	0%	
Suðuroyar Sýsla		5.412.859	0%	1%	
S.12501 Onnur fíggjarlig millumgongufeløg; almenn	**7.096.477**	**7.189.827**	**100%**	**100%**	**1%**
Norðoya Sýsla	160.000	201.480	2%	3%	26%
Suðurstreymoyar Sýsla	6.936.477	6.988.347	98%	97%	1%
S.12601 Fíggjarligar hjálpieindir; almennar	**204.149**		**100%**		
Suðurstreymoyar Sýsla	204.149		100%		
S.12701 Konsernatknýttir fíggjarstovnar og lángevar; almennir	**783.000**		**100%**		
Suðurstreymoyar Sýsla	783.000		100%		
S.13111 Landsfyrisiting og tænasta	**1.816.150.608**	**2.317.342.074**	**100%**	**100%**	**28%**
Norðoya Sýsla	152.043.703	168.760.215	8%	7%	11%
Eysturoyar Sýsla	134.540.330	169.207.497	7%	7%	26%
Norðstreymoyar Sýsla	29.589.067	42.606.274	2%	2%	44%
Suðurstreymoyar Sýsla	1.219.067.665	1.667.044.180	67%	72%	37%
Vága Sýsla	87.316.650	37.377.238	5%	2%	-57%
Sandoyar Sýsla	8.173.011	14.554.223	0%	1%	78%
Suðuroyar Sýsla	185.420.183	217.792.447	10%	9%	17%
S.13112 Ríkisfyrisiting og tænasta	**105.939.904**	**115.504.321**	**100%**	**100%**	**9%**
Suðurstreymoyar Sýsla	105.939.904	115.504.321	100%	100%	9%
S.13131 Kommunufyrisiting og tænasta	**685.107.578**	**1.233.060.229**	**100%**	**100%**	**80%**
Norðoya Sýsla	77.179.074	116.472.372	11%	9%	51%
Eysturoyar Sýsla	148.875.960	243.699.281	22%	20%	64%
Norðstreymoyar Sýsla	25.391.981	31.296.253	4%	3%	23%
Suðurstreymoyar Sýsla	328.637.958	680.928.826	48%	55%	107%
Vága Sýsla	39.326.526	60.935.548	6%	5%	55%
Sandoyar Sýsla	11.543.317	17.897.823	2%	1%	55%
Suðuroyar Sýsla	54.152.761	81.830.126	8%	7%	51%
S.13132 Felagskommunal fyrisiting og tænasta	**71.458.643**	**304.119.390**	**100%**	**100%**	**326%**
Norðoya Sýsla		61.659.947	0%	20%	
Eysturoyar Sýsla	31.572.435	97.503.788	44%	32%	209%
Norðstreymoyar Sýsla		39.067.708	0%	13%	
Suðurstreymoyar Sýsla	26.939.846	8.294.350	38%	3%	-69%
Vága Sýsla		29.590.513	0%	10%	
Sandoyar Sýsla	12.602.540	19.465.485	18%	6%	54%
Suðuroyar Sýsla	343.822	48.537.599	0%	16%	14017%
S.13142 Aðrir sosialir trygdargrunnar	**18.084.474**	**29.323.047**	**100%**	**100%**	**62%**
Norðoya Sýsla	3.709.157	13.655.599	21%	47%	268%
Eysturoyar Sýsla	41.250		0%	0%	
Norðstreymoyar Sýsla	43.000		0%	0%	
Suðurstreymoyar Sýsla	14.152.381	15.078.885	78%	51%	7%
Vága Sýsla	48.000		0%	0%	
Suðuroyar Sýsla	90.686	588.564	1%	2%	549%

Skjal 2.: Útgoldin løn yvir samtíðarskattaskipanina (STSS) hjá almenna geiranum **býtt bústaðaraøki** hjá løntakara. Kelda: Hagstovan

Útgoldin løn yvir samtíðarskattaskipanina (STSS) hjá almenna geiranum býtt bústaðaraøki hjá løntakara	2012	2022	%-býti, 2012	%-býti, 2022	%-br, 2012-2022
Tað almenna tilsamans	**3.123.182.569**	**4.578.569.200**	**100%**	**100%**	**47%**
Norðoya Sýsla	290.432.620	424.773.928	9%	9%	46%
Eysturoyar Sýsla	526.070.085	825.105.086	17%	18%	57%
Norðstreymoyar Sýsla	212.314.247	301.567.096	7%	7%	42%
Suðuroyar Sýsla	244.785.841	349.950.263	8%	8%	43%
Vága Sýsla	198.460.241	281.643.354	6%	6%	42%
Sandoyar Sýsla	62.529.122	95.934.073	2%	2%	53%
Suðurstreymoyar Sýsla	1.536.886.945	2.202.742.373	49%	48%	43%
Útland	51.703.469	96.853.026	2%	2%	87%
S.11101 Ikki-figgjarlig feløg; almenn	**418.357.737**	**572.030.312**	**100%**	**100%**	**37%**
Norðoya Sýsla	26.852.172	36.553.389	6%	6%	36%
Eysturoyar Sýsla	61.247.728	90.082.454	15%	16%	47%
Norðstreymoyar Sýsla	34.969.695	42.411.135	8%	7%	21%
Suðuroyar Sýsla	22.117.397	29.635.508	5%	5%	34%
Vága Sýsla	62.207.443	86.590.399	15%	15%	39%
Sandoyar Sýsla	8.288.796	9.394.564	2%	2%	13%
Suðurstreymoyar Sýsla	190.621.200	263.472.684	46%	46%	38%
Útland	12.053.306	13.890.180	3%	2%	15%
S.12501 Onnur figgjarlig millumgongufeløg; almenn	**7.096.477**	**7.189.827**	**100%**	**100%**	**1%**
Norðoya Sýsla	552.669	339.750	8%	5%	-39%
Eysturoyar Sýsla	235.464	188.821	3%	3%	-20%
Norðstreymoyar Sýsla	516.892	1.319.953	7%	18%	155%
Suðuroyar Sýsla		121.833	0%	2%	
Vága Sýsla	722.061	93.283	10%	1%	-87%
Sandoyar Sýsla	443.746	514.101	6%	7%	16%
Suðurstreymoyar Sýsla	4.565.645	4.481.730	64%	62%	-2%
Útland	60.000	130.356	1%	2%	117%
S.12601 Fíggjarligar hjálpieindir; almennar	**204.149**		**100%**		
Eysturoyar Sýsla	8.000		4%		
Suðurstreymoyar Sýsla	160.149		78%		
Útland	36.000		18%		
S.12701 Konsernatknýttir fíggjarstovnar og lángevar; almennir	**783.000**		**100%**		
Norðoya Sýsla	108.000		14%		
Suðuroyar Sýsla	108.000		14%		
Suðurstreymoyar Sýsla	567.000		72%		
S.13111 Landsfyrisiting og tænasta	**1.816.150.608**	**2.317.342.074**	**100%**	**100%**	**28%**
Norðoya Sýsla	178.735.606	202.052.227	10%	9%	13%
Eysturoyar Sýsla	273.186.410	367.836.648	15%	16%	35%
Norðstreymoyar Sýsla	109.546.304	123.871.486	6%	5%	13%
Suðuroyar Sýsla	161.083.764	180.476.026	9%	8%	12%
Vága Sýsla	80.023.857	88.643.493	4%	4%	11%
Sandoyar Sýsla	26.137.221	42.409.271	1%	2%	62%
Suðurstreymoyar Sýsla	953.649.968	1.245.994.251	53%	54%	31%
Útland	33.787.477	66.058.672	2%	3%	96%
S.13112 Ríkisfyrisiting og tænasta	**105.939.904**	**115.504.321**	**100%**	**100%**	**9%**
Norðoya Sýsla	5.140.318	5.524.194	5%	5%	7%
Eysturoyar Sýsla	11.618.122	10.507.885	11%	9%	-10%
Norðstreymoyar Sýsla	8.256.587	9.466.379	8%	8%	15%
Suðuroyar Sýsla	6.630.864	6.387.914	6%	6%	-4%
Vága Sýsla	12.582.406	10.033.437	12%	9%	-20%
Sandoyar Sýsla	1.265.952	1.210.357	1%	1%	-4%
Suðurstreymoyar Sýsla	59.880.323	72.111.178	57%	62%	20%
Útland	565.332	262.978	1%	0%	-53%
S.13131 Kommunufyrisiting og tænasta	**685.107.578**	**1.233.060.229**	**100%**	**100%**	**80%**
Norðoya Sýsla	75.894.624	117.067.864	11%	9%	54%
Eysturoyar Sýsla	144.930.422	242.594.333	21%	20%	67%
Norðstreymoyar Sýsla	55.762.367	96.687.207	8%	8%	73%
Suðuroyar Sýsla	54.070.258	84.269.645	8%	7%	56%
Vága Sýsla	42.363.410	67.436.801	6%	5%	59%
Sandoyar Sýsla	14.056.804	24.076.783	2%	2%	71%
Suðurstreymoyar Sýsla	293.624.620	591.649.852	43%	48%	101%
Útland	4.405.073	9.277.744	1%	1%	111%
S.13132 Felagskommunal fyrisiting og tænasta	**71.458.643**	**304.119.390**	**100%**	**100%**	**326%**
Norðoya Sýsla	935.908	60.113.878	1%	20%	6323%
Eysturoyar Sýsla	31.891.942	107.298.458	45%	35%	236%
Norðstreymoyar Sýsla	1.901.066	26.717.481	3%	9%	1305%
Suðuroyar Sýsla	625.071	48.660.586	1%	16%	7685%
Vága Sýsla	330.666	28.577.789	0%	9%	8542%
Sandoyar Sýsla	12.313.089	18.325.367	17%	6%	49%
Suðurstreymoyar Sýsla	22.709.719	11.623.444	32%	4%	-49%
Útland	751.182	2.802.386	1%	1%	273%
S.13142 Aðrir sosialir trygdargrunnar	**18.084.474**	**29.323.047**	**100%**	**100%**	**62%**
Norðoya Sýsla	2.213.322	3.122.627	12%	11%	41%
Eysturoyar Sýsla	2.951.996	6.596.487	16%	22%	123%
Norðstreymoyar Sýsla	1.361.338	1.093.455	8%	4%	-20%
Suðuroyar Sýsla	150.488	398.751	1%	1%	165%
Vága Sýsla	230.398	268.151	1%	1%	16%
Sandoyar Sýsla	23.514	3.630	0%	0%	-85%
Suðurstreymoyar Sýsla	11.108.321	13.409.235	61%	46%	21%
Útland	45.098	4.430.712	0%	15%	9725%